## 39 feløg í Fútarættin

Tá Skráseting Føroya í gjárkvøldið gjørdi upp, hvussu nógvir partafelagsroknskapir vórðu innkomnir, restaðu framvegis 39 partafeløg, sum ikki hava sent inn roknskapin. Hesi feløg eru í dag borin niðan í Fútarættin við kravi um avtøku. Tá tey komu til arbeiðis í gjár á Skráseting Føroya restaðu 250 roknskapir – so tey høvdu ein rokaligan dag á Skrásetingini í gjár – og kl 22 vóru tey liðug at gjøgnum ganga allar.




## 52 nýggj fólk í Eik

Seinasta árið eru 52 nýggj fólk sett í starv í Eik – av teimum eru 11 nýggir bankanæmingar, sum byrjaðu í læru í Eik fyrr í hesum mánaðinum. 1. september byrjaðu hesi í bankalæru í Eik: Aftast f.v.: Kári Olsen, Tórshavn, Jóhann á Stongum, Sørvágur, Ann Tordis Hellisdal, Kollafjørður, Magnus Skoralíð, Saltangará, Randi Wardum, Tórshavn, og Símin Louis Jacobsen, Fuglafjørður. Fremt f.v.: Carl Herup Olsen, Tórshavn, Ysmhael Thorgeirsson, Sandur, Hansina Sigurðsson, Klaksvík, Beinir Midjord, Tórshavn og Kristian Kristiansen, Norðskáli

# Bíða eftir vanlukkuni

**Tað er reint ferðslukaos um morgnarnar, tá foreldur koma við børnunum í Hoyvíkar skúla. Fleiri foreldur eru so ótrygg, at tey ivast í, um tey skulu tora at lata børnini fara í skúla yvirhøvur**

FERÐSLUTRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Orsakað av arbeiðinum at gera parkeringspláss, er gøtan burtur, sum gekk framvið ítróttarhøllini, og tí mugu børnini ganga ímillum bilarnar, tá tey skulu í skúla uppi í Hoyvík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fríggjadagin hendi tað so. Ein genta á veg í Hoyvíkar skúla varð árend av einum bili.

Tíbetur hendi eingin álvarsligur skaði, men sambært Ninnu Dahl, mammu at árendu gentuni, so eru tey fleiri foreldur, sum bara bíða eftir, at vanlukkan skal henda.

- Tað er eitt satt ferðslukaos uppi við skúlan í Hoyvík um morgnarnar. Børn og bilar hvørt um annað. Einki parkeringspláss, har bilarnir kunnu steðga, so foreldrini trygt kunnu seta børnini av, sigur Ninna Dahl.

Hon vísir á, at tað plagdi at vera ein gøta framvið Hoyvíkshøllini, har børnini trygg kundu ganga, men í løtuni er kommunan við at gera parkeringspláss í økinum, og tí er gøtan burtur.

- Tað er ikki bara eg, og tað er ikki tí, at tað júst var mín dóttir, sum varð árend fríggjadagin. Tað eru so ógvuliga nógv foreldur, sum eru ótrygg við støðuna. Fleiri ivast í, um tey skulu lata børn síni fara í skúla yvirhøvur, soleiðis sum støðan er, sigur Ninna Dahl.

Tað er ein rættiliga stór ferðsla eftir Vegnum Langa, bæði vanlig ferðsla, foreldur, sum koyra síni børn í skúla og eisini arbeiðsferðsla við tungum og stórum bilum. Og hetta er framvið einum skúla, har 500 børn ganga, umframt eini 150 í frítíðarskúla, verður víst á.

### Gøtan burtur

Nógva ferðslan og vánaligu steðgi- og parkeringsviðurskiftini gera, at leiðin í skúla verður ótrygg hjá børnunum. Og hetta er ikki bert galdandi fyri tey, sum koma í bili í skúla.

- Fyrr var ein gøta fram við ítróttarhøllini, sum børnini, ið komu við bussinum, kundu nýta. Men orsakað av arbeiðinum við at gera parkeringspláss, er hendan gøtan nú burtur og tað ger, at øll børnini nú mugu ganga millum bilarnar fyri at koma í skúla, sigur Ninna Dahl.

Hesi óskipaðu viðurskiftini gera altso, at foreldur langt frá eru trygg við at senda børn síni í skúla. Tey ræðast stutt sagt fyri, at vanlukkan skal henda ein dag.

# Vil betra um ferðsluna

**Tað er sjálvandi harmiligt, um ferðsluviðurskiftini gera foreldur ótrygg, men tað er júst fyri at betra um hesi, at arbeiði fer fram í løtuni, sigur Heðin Mortensen**

FERÐSLUTRYGD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í sambandi við ferðslukaosið við Hoyvíkar skúla, sum er nevnt í greinini omanfyri, hevur Sosialurin vent sær til borgarstjóran í Havnar Kommunu fyri at fáa eina viðmerking.

Heðin Mortensen sigur, at tað sjálvandi altíð er harmiligt, um folk ikki kenna seg trygg við einihvørji viðurskifti, men hann vísir í hesum førinum á, at ógvuliga nógv virksemi hevur verið í økinum í longri tíð.

- Har er jú bæði skúli, ítróttarhøll og frítíðarskúli bygt seinastu árini, og stóra og økta virksemið krevur nøktandi atkomuviðurskifti. Talan er um eina verkætlan nú, sum er í fýra stigum, so sum víst á tekningini. Stig eitt og tvey eru fyri so vítt liðug, og stórur dentur verður í løtuni lagdur á stig trý, sum júst er ætlað at gera atkomuviðurskiftini so góð sum tilber, sigur Heðin Mortensen.

Borgarstjórin sigur, at hóast partur av arbeiðinum er settur av á fíggjarlógini fyri komandi ár, so verður doyðurin lagdur á at gera í hvussu er stig trý liðugt skjótast tilber.

Tá hesin parturin er liðugur, kann koyrast inn til skúlan eftir einvegis gjøgnumkoyring, børnini kunnu setast av, og so verður koyrt út sunnanvert.

- Tá verður talan um skipað og trygg viðurskifti, so foreldur uttan ampa kunnu seta síni børn av, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Hetta er ætlanin, sum kommunan arbeiðir eftir, og tá stig trý er liðugt, fara foreldur uttan ampa at kunna koyra síni børn í skúla.



*Soleiðis sær ætlanin hjá kommununi út við Hoyvíkar skúla*